# Vilt tú verða við til vøkstur og menning?

TRYGD er eitt tryggingarfelag í vøkstri, og fyri at styrkja tænastuliðið, søkja vit eftir skaðaviðgerða, sýnsfólki og søluráðgeva.

**Hvør ert tú?**
Í TRYGD leggja vit størsta dentin á persónligar eginleikar og hugburðin hjá tí einstaka starvsfólkinum. Harnæst koma bókligu útbúgvingarnar og fakligi førleikin. Vit ímynda okkum at tey ið sett verða í starv, hava niðanfyristandandi bókligar bakgrundir:

**Skaðaviðgerðin**
Hægri útbúgving frá lærdum háskúla við 3 til 5 ára starvsroyndum.

**Sýnsfólk**
Byggifrøðingur ella handverkaraútbúgving við møguligari eftirútbúgving. Haraftrat arbeiðsroyndir frá byggivinnuni í 3 til 5 ár.

**Søluráðgevin**
Prógv frá Hægri Handilsskúla ella tilsvarandi útbúgving. Haraftrat arbeiðsroyndir innan søluarbeiði.

Felags fyri størvini eru krøvini til persónligu eginleikarnar hjá teimum, ið sett verða:

- Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt, samstundis sum tú kanst samstarva og taka ábyrgd
- Tú ert fyrikomandi og hevur lætt við at seta teg í samband við fólk
- Tú ert málsøkin og opin fyri broytingum
- Tú arbeiðir skjótt, skipað og torir at taka avgerðir
- Tú hevur handilsligan sans og hevur eitt munagott tænastusinni
- Tú ynskir framhaldandi at útbúgva teg

**Vit bjóða**
Hóast størvini taka støði í hvør sínum fakliga palli, kunnu tey, ið sett verða, seta sín persónliga dám á arbeiðsliga umhvørvið. Uppgávurnar eru fjølbroyttar og avbjóðingarnar eru nógvar. Høvið er sjálvsagt fyri framhaldandi, persónligari, eins væl og fakligari menning í einum livandi og tvørfakligum umhvørvi. Sum starvsfólk í TRYGD, verður tú partur av áhaldandi menningini av felagnum og tær persónligu dygdir, ið tú hevur við tær inn í felagið, koma at gera sítt til at TRYGD gerst enn sterkari. Størvini verða sett og lønt eftir sáttmála við Finansforbundet.

**Umsóknir og starvssetan**
Størvini ynskjast sett skjótast tilber, men vit eru eisini sinnað at bíða eftir rætta viðkomandi. Skrivlig umsókn, við curriculum vitae og tilhoyrandi skjølum, skal vera okkum í hendi innan 7. september 2005, skal sendast til:

P/F TRYGD
Att.: Ali Celebi
Gongin 7
Postboks 44
110 Tórshavn
Teldupostur: ace@trygd.fo

Trygd · Gongin 7 · Postboks 44 · FO - 110 Tórshavn · Tel. +298 35 81 00 · Fax +298 31 72 11
www.trygd.fo

TRYGD

TEAM85



# Sosialráðgevarar

**Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.**

**Fyri at betra um tænastustøðið hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar. Høvuðsuppgávan hjá økisdeildunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni, og at taka avgerðir um veitingar smb. somu lógir.**

**Á økisdeildini í Havn arbeiða 14 fólk - 5 málsviðgerar, 8 sosialráðgevarar og deildarleiðari. Deildin fevnir um hesi øki í landinum: Vágar, Mykines, Koltur, Hest, Sandoy, Skúvoy, S.Dímun, Nólsoy og Streymoy.**

Á økisdeildini hjá Almannastovuni í Havn eru tvey sosialráðgevararstørv leys at søkja. Annað starvið er eitt fast starv, sum er leyst til setan 1.10.05. Hitt starvið er eitt avloysarastarv fyri sosialráðgeva, sum er í farloyvi til 31.5.06. Hetta starvið er leyst til setan beinanvegin.

Arbeiðsuppgávurnar hjá sosialráðgevunum eru at ráðgeva og vegleiða borgarum í økinum í almannaspurningum, at gera tilráðingar í smb. við umsóknir um fyritíðarpensjón frá fólki yvir 60 ár, og at viðgera umsóknir um:

- uppihaldshjálp
- persónliga viðbót
- hjálparráð og
- samsýning fyri ansing.

Okkara ynski er, at tú ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávurnar í tráð við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar, stovnurin hevur.

Starvið umfatar í høvuðsheitum ráðgeving og vegleiðing av borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar, íverksetan av fyriskipanum og annað.

Vit sóknast eftir fólki við sosialráðgevaraútbúgving. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan almenna umsiting, góðan telduførleika á brúkarastøði, kunnleika til skrásetingararbeiði og góðan førleika í føroyskum.

Størvini verða sett og lønt sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 6.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Eyðvør Mortensen, deildarleiðari, á telefon 353570.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 10.9.05.

Send umsóknina til
Almannastovuna
Smyrilsveg 20
Postboks 3096
110 Tórshavn.

almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

KREA-FO TEL 44 93 39